# Føroyingar vilja keypa Hotel Føroyar

**Samráðingar eru í løtuni millum Smyril Line og føroyskar keyparar, ið eru áhugaðir í Hotel Føroyum. Eisini aðrar ognir hjá Smyril Line eru á sølulista**

BJARGING
*Edvard Joensen*

Alt verður í hesum døgum gjørt fyri at bjarga Norrönu. Millum annað eru samráðingar um at selja burtur av øðrum ognum hjá Smyril Line. Tað mest ítøkiliga í løtuni er søla av hotellinum við Oyggjarvegin.

Klæmint Weihe, nevndarformaður í Smyril Line, váttar, at samráðingar í løtuni eru við áhugarar keyparar, sum vilja hava Hotel Føroyar. Við í teirri søluni er eisini vallaraheimið, sum liggur við síðuna av hotellinum, sigur Klæmint Weihe.



*Útferðarskipið Norðlysið, sum Smyril Line eigur, er eitt av aktivunum, ið nevnt er sum møgulig søluvøra fyri at fáa til vega kapital til at bjarga Norrönu*
*Mynd: Edvard Joensen*

Hann sigur, at talan er um føroyingar, sum samráðingar nú eru við. Onkur útlendingur hevur eisini víst áhuga, men tær seriøsu samráðingarnar eru so bara við tann eina partin í løtuni. Hvør tað er, og hvussu nógv boðið er, vil nevndarformaðurin ikki siga nakað um.

Eisini aðrar ognir hjá Smyril Line hava verið nevndar í samband við, at seljast skal fyri at fáa til vega likviditet til at bjarga Norrönu. Skrivstovubygningarnir við Jónas Broncksgøtu hava verið nevndir, eins og útferðarskipið Norðlýsið eisini hevur verið umtalað sum ein møgulig inntøkukelda.

Norröna fer fyribils at halda fram at sigla sum higartil. Samráðingarnar við Fjord Line ganga sína gongd sigur Klæmint Weihe, og í hvussu er til jólasiglingin er av, fer Norröna at sigla upp á Føroyar.

– Og so aftur í summar. Tað er heilt víst, at vanliga summarsiglingin verður, sum hon plagar at vera, og tað verður Norröna, sum fer at sigla, sigur Klæmint Weihe. nevndarformaður i Smyril Line.

# Smyril Line fer at yvirliva

**Nevndarformaðurin í Smyril Line sær bjartari upp á framtíðina eftir eykaaðalfundin týsdagin, har nevndin fekk loyvi frá partaeigarunum til at hækka partapeningin**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

Vónirnar eru bjartari nú, nevndin í Smyril Line hevur fingið loyvi frá partaeigarunum at hækka partapeningin, sigur nevndarformaðurin í Smyril Line, Klæmint Weihe.

Á eykaaðalfundinum hjá Smyril Line týsdagin boðaðu teir báðir stóru føroysku partaeigararnir, Tryggingarfelagið Føroyar og Framtaksgrunnur Føroya, frá, at teir góvu loyvi til, at partapeningurin í felagnum verður hækkaður.

## Teir stóru játta

Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum, segði við Sosialin beint eftir fundin, at Tryggingarfelagið hevði gjørt av at hækka sín partapening í mun til samlaðu hækkingina. Við teimum tølum, sum fyriliggja, verður nýggja innskotið hjá Tryggingarfelagnum slakar 10 milliónir krónur, sigur hann.

Hin stóri føroyski partaeigarin er Framtaksgrunnurin. Nevndarformaðurin í grunninum, Dagmar Joensen, sigur, at leiðslan fyri Framtaksgrunnin hevur gjørt av, at viðmæla, at partapeningurin verður hækkaður. Og hesum boðaði grunnurin frá á eykaaðalfundinum týsdagin.

Men Framtaksgrunnurin hevur ikki gjørt av, um grunnurin sjálvur skal seta nýggjan partapening í felagið. Og heldur ikki, um so verður, hvussu nógv tað skal vera, sigur Dagmar Joensen

## Útlendingarnir

Tað sær ikki so galið út í løtuni, sigur nevndarformaðurin i Smyril Line, Klæmint Weihe.

Nú játtan er komin frá Tryggingini um slakar 10 milliónir, og hetlendingar hava sett góðar 30 milliónir í okkara peningi í felagið, mangla einar 18 milliónir í tær 60, sum kravið frá fíggingarstovninum er. Fáa vit nú hinar stóru partaeigararnar at seta í í sama lutfalli, er fyrsta málið rokkið. So er eftir at fáa hinar partaeigararnar at hækka sín part. Hinir stóru partaeigarnir, nevndarformaðurin tosar um, er umframt Framtaksgrunnin tveir íslendskir íleggjarar.



*Halda allir teir stóru partaeigararnir í Smyril Line sítt, fer tað at bera til at savna neyðuga partapeningin, sigur nevndarformðaurin, Klæmint Weihe*


merko JÓLAKALENDARIN
Hósdagur 23. desember 2004

ynskir øllum eini hugnalig og gleðilig jól

Hamburgarryggur u/bein fyri kg.



49⁹⁵

SUPER Majsblanding 1 kg.




12⁹⁵



SPURNINGUR
Hvør hevur skrivað bøkurnar: Sigling & útbúgving ?

Tilboðið er bert galdandi hósdagin 23. desember 2004

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum



SVAR

NAVN & TELEFON NUMMAR